**Steffan Klein Poulsen**
**Jenis av Rana**
**løgtingsmenn**

Løgtingið

**Uppskot til samtyktar um at verja børnini ímóti porno og øðrum ágangi á internetinum**

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið heitir á landsstýrið um at kanna møguleikarnar fyri tekniskum loysnum, ið verja børnini ímóti porno og øðrum ágangi á internetinum og at gera ein almennan politikk um, hvussu foreldur verja síni børn á bestan hátt og leggja fram neyðug lógaruppskot í hesum sambandi.

**Viðmerkingar:**

Tøkniliga menningin
Porno hevur altíð verið at funnið í onkrum formi: á krukkum frá gamlari tíð í Grikkalandi og aðrar málaðar og teknaðar myndir upp ígjøgnum tíðina, sum seinni blivu til fotograferaðar myndir í bløðum, sum uppaftur seinni blivu til livandi myndir í biografum og at enda komu á skermarnar heima við hús.

Í dag hava vit internetið, sum gevur øllum borgarum, ið hava eina teldu, teldil ella snildfon, atgongd til eina øgiliga rúgvu av tilfari. Eisini porno, sum ein triðingur av internet nýtsluni sigst at fara til. Vit koyra eitt experiment ,sum ongantíð er roynt áður. Experimentið er, at øll fólk, børn sum vaksin, hava atgongd til endaleyst og ógvisligt pornografiskt tilfar á internetinum. Hetta kann hava katastrofalar avleiðingar við sær í framtíðini, tá ið hugsað verður um, hvussu skaðiligt porno er.

Avleiðingarnar
Avleiðingarnar av porno kunnu deilast upp í tey trý H'ini: *Heilin, hjartað og heimurin*.

*Heilin.* Porno er ikki eitt fysiskt rúsevni, sum vit menniskju inntaka, og tí hava vísindafólk verið ósamd um, um tað ber til at blíva bundin av porno. Tó finnast fleiri vísindafólk, sum granska í heilanum og sum meta, at porno ávirkar evnafrøðilig viðurskifti í heilanum. Hesir granskarar siga, at tá ein hyggur at porno, útloysast fleiri kemisk evni í heilanum, millum annað dopamin, sum gevur forbrúkaranum eitt njótilsi. Hetta verður kallað lønarsentrið í heilanum (reward center).

Trupulleikin við hesum lønarsentri er, at heilin blívur tolerantur við tíðini og tí ynskir størri mongdir av porno fyri at fáa sama njótilsi. So eins og ein misbrúkari oftani økir um mongdirnar av rúsum og

søkir sær sterkari rúsevni við tíðini, so vil ein, sum hyggur at porno, fáa eina tráan eftir meiri og grovari tilfari. Hetta er orsøkin til, at pornografiska nýtslan ofta fer frá at vera einaferð um mánaðin til einaferð um dagin. Og at nýtslan fer frá tí milda til tað grova tilfarið.

*Hjartað* er eitt symbol uppá relatiónir. Øll ynskja at hava góðar og sunnar relatiónir, serliga við sín maka. Porno kann oyðileggja hesa relatiónina, tí nýtslan av porno ger, at ein blívur meira kritiskur mótvegis makanum og minni nøgdur við sexlívið.

Ein porno filmur á 45 min. kann t.d. hava tikið einar 3 dagar at filma av einum professionellum filmstoymi. Tey fáa alt at síggja perfekt út við make-up, plastik viðgerðum, klippa feilir út, filma røttu vinklarnar, photoshoppa o.s.fr.. Endaligi filmurin lýsir als ikki vanligt ella náttúrligt sex. Pornofilmarnir skapa hinvegin eina skeiva mynd av sex og ein forvæntning, ið ikki ber til at nøkta hjá makanum.

Høg nýtsla av porno ger eisini, at fólk hava lyndi til at isolera seg, heldur enn at søkja felagsskap við onnur.

*Heimurin.* Tvey tey fyrstu punktini “heilin” og “hjartað” lýsa avleiðingarnar á tann einstaka. Ein skal tó hava í mentu, at tað eru hundraðtals milliónir menniskju, ið er bundin av porno. Avleiðingin er ein stórur og óhugnaligur pornoídnaður! Ein ídnaður, sum framleiðir grovari og grovari porno. Ein ídnaður, sum ger brúkaran meiri og meiri bundnan. Ein ídnaður, sum sex trafficking er ein partur av, bæði beinleiðis og óbeinleiðis.

Tað verður mett, at tað eru 21 til 31 mió. trælir innan allar ídnaðir kring heimin. Hesir trælir framleiða eitt mett yvirskot til trælaeigararnar á 150 mia. USD. Umleið 22% av hesum trælunum eru partur av sex ídnaðinum. Hesi 22% framleiða uml. 2/3 (66%) av yvirskotinum, sum samlaði trælahandilin gevur. Tað svarar til einar 100 mia. USD. Gera vit tað upp í DKK svarar tað til góðar 700 mia. kr. Hetta gevur okkum eina mynd av, hvussu nógvir pengar eru í trælahaldi og serliga innan fyri sex-trælahald.

Til seinast má nevnast, at gransking og kanningar av porno ikki eru bundnar at nakrari religión ella persónligari meining. Tað eru kanningar, ið eru blivnar “peer reviewed”, eisini kallað “referee reviewed”, sum í grundini merkir, at tær eru góðtiknar eftir strangum reglugerðum. Við øðrum orðum: komnar ígjøgnum nálareygað.

Vit mugu verja børnini

Børn og ung blíva útsett fyri porno og øðrum ágangi á internetinum; tí noyðast vit at gera meiri fyri at verja tey. Tølini lúgva ikki, tey eru sera sera ung, tá tey møta porno fyri fyrstu ferð:

- Tað er vanligt, at børn koma fram á porno í aldrinum 8-12 ár.
- Meirilutin av 13 ára gomlum hava sæð porno.
- Í minsta lagi ein av trimum pornofilmum inniheldur harðskap.
- Hóast porno er sera veruleikafjart, so heldur ein av fýra ungdómum, at porno er besta keldan til at læra um sex.

Onnur tøl vísa eisini, at tað serliga eru ungir menn, sum hyggja at porno. Samstundis sæst eisini, at porno er ein vaksandi trupulleiki millum kvinnur. Porno er ikki bara ein trupulleiki millum ungar menn, men allar samfelagsbólkar og bæði kynini.

Tølini omanfyri eru úr útlondum, men hví skuldu Føroyar verið eitt undantak? Internetið er jú ein alheims pallur, sum føroyingar nýta minst líka nógv, sum onnur fólkasløg.

Loysnin?
Tað eru fyrst og fremst foreldur, ið hava ábyrgd av sínum børnum. Tey eiga tí at verja børnini ímóti porno við at avmarka atgongdina til internetið á ein ella annan hátt.

Tað kann tó vera trupult hjá foreldurm at klára hetta einsamøll. Tí má Løgtingið gera, eins og tað bleiv gjørt afturi í 80-unum. Tá blivu pornobløðini í handlunum goymd aftanfyri handilsdiskin fyri at skána børnini, eftir at Tordur Niclasen, saman við hinum í Løgtinginum, minti fútan á at røkja sínar skyldur hesum viðvíkjandi (Lm. 73, 1982). Í dag er veruleikin ein annar, og vit mugu enn einaferð finna útav, hvussu vit goyma pornografiska tilfarið burtur fyri at verja børnini. Samstundis eiga foreldur at fáa almennar leiðreglur (tilmæli) um, hvussu tey verja síni børn á bestan hátt.

Bretland, Týskland og Frankaríki eru nøkur av londunum, ið arbeiða við at setur filtur á porno heimasíður. Í dag er tað alt ov lætt hjá børnum at sleppa inn á porno síður, tí tað einasta sum krevst, er at barnið trýstir á "ja eg eri 18+ ár" fyri at sleppa inn. Fransmenninir arbeiða t.d. við, at teirra borgarar nú skulu vátta við onkrum formi av ID, at teir eru 18 ár ella eldri, fyri at fáa atgongd til pornografiskt tilfar. Summi hava longu doypt hesa loysnina "pornopass".

Samanumtikið, so snýr tað seg fyrst og fremst um at viðurkenna, at porno er ein samfelags trupulleiki. Síðani skulu vit finna viljan fram, og tá skulu loysnirnar nokk koma.

**Á Løgtingi, 7. mars 2023**

Steffan Klein Poulsen    Jenis av Rana